

MARS 2021

# TJÓÐLEIKHÚS

## UPPSKOT TIL STAÐSETING

## DÓMSNEVNDARÁLIT

Mynd frá operuni: í Óðmansgarði, Tjóðpallur Føroya 2006, mynd: Martin Sirkovsky

# Tjóðleikhús – staðseting

Uttanríkis- og mentamálaráðið og Landsverk fóru í fjør undir eina tilgongd um nýtt tjóðleikhús í Tórshavn.
Fyrsta stigið í verkætlanartilgondini er at vísa á best egnaðu staðseting fyri tjóðleikhúsið.
5 ráðgevaratoymi eru undangóðkend at taka lut í tilgongdini.
Hesi toymini eru

- Kontrast
- MAP Arkitektar
- Henning Larsen NA
- SNA Selmar Nielsen Arkitektar / White Arkitektar
- Zeta architects / Brim Arkitektar

Tá ið innlatingarfreistin var úti, tann 2. februar 2021, vóru 7 uppkot til staðseting latin inn.
Øll uppskotini luku treytirnar fyri at verða viðgjørd.
Ein dómsnevnd hevur síðan viðgjørt uppskotini.
Í dómsnevndini eru:

- Ólavur Jøkladal - Formaður í Leiklistaráðnum, formaður í dómsnevndini
- Bjarni Wilhelm - Formaður í bygginevndini fyri Tjóðleikhúsið
- Poul Geert Hansen - Aðalstjóri í Uttanríkis- og mentamálaráðnum
- Jenny C. Petersen - Stjóri í Tjóðpalli Føroya
- Jóan Petur Hentze - Trivnaðarstjóri í Tórshavnar kommunu
- Birita Wardum - Býararkitektur í Tórshavnar kommunu
- Bárður í Baianstovu - Arkitektur hjá Landsverk
- Ellen Braae - Fakdómari, tilnevnd av Arkitektafelag Føroya
- Thale Bjørnerheim - Fakdómari, tilnevnd av Arkitektafelag Føroya

Ráðgevarar hjá dómsnevndini eru:

- Christian Djurhuus, verkætlanarleiðari hjá Landsverk
- Ólavur J. Hansen, løgfrøðingur hjá Landsverk

Skrivari hjá dómanevndini er.

- Ole Jensen fyri Arkitektafelag Føroya

Dómsnevndin hevur havt 5 fundir, íroknað ástaðarfund á øllum staðsetingum, sum uppskotini vísa á. Fakdómarar hava tikið lut á fundunum umvegis Facetime og Teams.

Uppskotini eru mett í mun til hesar metingartreytir – raðfylgja ikki raðfest:
- Hvussu er volumen og økini uttanum skipað
- Hvussu volumen og økini uttanum ávirka nærumhvørvið ella býarumhvørvið sum heild
- Hvussu staðsetingin av Tjóðleikhúsinum kann verða mennandi fyri býin, sum savningarstaður og lívskapari
- Hvussu er staðsetingin til frama fyri virksemið í Tjóðleikhúsinum
- Hvussu er staðsetingin í mun til logistikk og infrastruktur. Fólk til gongu, á súkklu, í bussum ella bilum - atkomuviðurskifti hjá vitjandi
- Hvussu til- og frákoyring og parkering er loyst; fyri starvsfólk, vitjandi, vørukoyring og annað
- At fyrilit eru tikin fyri møguligum óljóði frá grannalagnum, sum kann ávirka virksemið í Tjóðleikhúsinum

## Dómsnevndarálit

**Almennar viðmerkingar:**

Fyrsta stigið hevur til endamáls at kanna og vísa á møguleikar fyri staðseting av Tjóðleikhúsinum. Yvirskipað vísa uppskotini á tríggjar ymiskar staðsetingar:
1: Á Skálatrøð við Vestaru Vág,
2: Fleiri møguligar staðsetingar á økinum framvið Eystaru Vág/á Eystaru Bryggju
3: Við Boðanes

Tilfarið í uppskotunum, sum eru komin inn, er ójavnt í tilgerð og stigi. Tey røkka frá at lýsa aðalviðurskiftuni í sambandi við staðseting, komu/parkering og leysliga at vísa á skapan av býarrúmi, til at lýsa og greina viðurskifti so sum óljóð, útsýni, ymiskar hættir at flyta seg v.m.

Summi uppskot vísa á staðseting, sum ber í sær broytingar og flyting av verandi nýtslu og virksemi á økinum, eins og bryggjan og bryggjukanturin í summum uppskotum er broyttur.

Fyri øll uppskot, sum vísa á staðseting við Eystaru vág kann væntast, at ristingar í undirlendinum verða frá skipum. Dómsnevndin metir, at tøkniligar loysnir eru, soleiðis at hetta ikki eigur at verða ein forðing fyri staðseting.
Ymiskar fortreytir, sum uppskotini byggja á, kunnu hava fíggjarligar og skipanarligar avleiðingar við sær. Tøkniliga eru tær til at loysa, og tær ávirka ikki metingarnar hjá dómsnevndini.

# Tjóðleikhús – yvirilit yvir uppskot til staðseting

| | | |
|---|---|---|
| 1 | Uppskot 22021 | Henning Larsen NA |
| 2 | Uppskot 75238 | Selmar Nielsen arkitektar / White arkitektar |
| 3 | Uppskot 71421 | Zeta architects/Brim Arkitektar |
| 4 | Uppskot 22021 | Henning Larsen NA |
| 5 | Uppskot 040926 | MAP Arkitektar |
| 6 | Uppskot 13579 | Kontrast |
| 7 | Uppskot 13579 | Kontrast |






**Niðurstøða:**

## Niðurstøðan hjá dómsnevndini er, at økið við Bursatanga er besta staðseting fyri Tjóðleikhúsið.

Niðurstøðan tekur serliga støði í uppskotunum 3 og 4, sum lýsa, at ein bygningur við Bursatanga kemur at standa á markamótinum millum bý og havn, millum land og hav.
Eitt nýtt Tjóðleikhús á hesum staði kann standa, sum ein stakbygningur og herviðbera tað sermerki og tign, sum Tjóðleikhúsið og virksemið í húsinum eigur at hava.

Eitt tjóðleikhús á hesi staðseting, sum er lutfalsliga nær Kongabrúnni, kann virka sum ein inngongd ella ein portalur til miðbýin, bæði frá sjógvi og landi.

Samstundis kann staðsetingin tillagast í mun til bryggjukantin og landslagsrúmið um Eystaru Vág, soleiðis at bygningurin ikki ger seg inn á útsýnið út á havnarøkið ella á Tinganes.

Útiøkini verða sjónlig frá býnum og bjóða gangandi til sjónleik, ella at fara til gongu framvið bryggjukantinum.

Hendan staðsetingin letur upp fyri tøttum sambandi við miðbýin, soleiðis at býarlívið og mentanarlívið verður víðkað til eisini at fevna um Tjóðleikhúsið og tey rúmini, bæði inni og úti, sum verða skapað har.

Atkoma fyri koyrandi kann verða eftir Havnargøtu, sum bindur miðbýin til teir størru ferðsluvegirnar í býnum og til ringvegin yviri við Strond.

Parkering kann skipast á landsynningspartinum av havnarøkinum, og vørukoyring til og frá húsinum kann skipast í sambandi við parkeringsøkið, uttan at vera til ampa fyri økini, sum venda móti vágni, ið rúma góðar møguleikar fyri fríløtuvirksemi.

Ein staðseting við Bursatanga kann harafturat verða fyrsta stigið í einari býarmenning á Eystaru Bryggju.



**Meting av innkomnum uppskotum.**

**Staðseting 1 (uppskot 22021-1) Á Skálatrøð**
Uppskotið lýsir, hvussu Tjóðleikhúsið, við hesari staðseting fær beinleiðis samband við Vestaru Vág, samstundis sum til ber at ganga framvið bryggjukantinum.

Harafturat bindur bygningurin mentanarvirksemið báðu megin Vágna saman og skapar hervið eina samanhangandi mentanarrás frá Norðurlandahúsinum til Listaskálan, Finsen, Vágsbotn og Skálatrøð.

Nýggja mentanarhúsið, Tjóðleikhúsið, verður her staðsett tætt við miðbýin. Dómsnevndin metir, at stóri bygningurin kann háttast og tillagast staðið, soleiðis at útsýnið frá býlinginum omanfyri Skálatrøð út á havnarøkið í nøktandi mun verður varðveitt.

Ein staðseting á Skálatrøð kann síggjast sum ein fullfíggjað býarmenning í hesum parti av býnum, sum arbeitt hevur verið við leingi, heldur enn ein tilgongd til nýggja býarmenning. Økið er so mikið avmarkað, at við einum Tjóðleikhúsi og parkeringshúsi, verður Skálatrøð fult útbygt.

Í dag eru umleið 220 p-pláss á økinum, sum fyri tað mesta verða nýtt í dagtímunum. Framtíðar parkering má skipast í bygningi á norðara partinum av økinum og gagnnýta jarðarmunin millum Skálatrøð og Gríms Kambansgøtu.

Uppskotið vísir á, at 230 og 300 p-pláss verða, býtt millum p-hús og parkering á lendinum. Hesi viðurskifti verða tó ikki lýst nærri, hvørki í vavi ella rúmligari tillaging. Tí er tað ringt at gera eina nágreiniliga meting um hesi viðurskifti.

Kanning av bygningsstøddum vísir, at hæddin á p-húsinum ikki verður til munandi ampa fyri útsýnið út á havnarøkið frá bygningunum aftanfyri.

Uppskotið vísir á møguleikan at gera ein p-tunnil inn í helluna undir Gríms Kambansgøtu. Viðurskiftuni viðvíkjandi fígging til p-hús og rakstur av p-húsinum verða ikki viðgjørd.

Ferðslan verður leidd millum p-húsið og Tjóðleikhúsið, og vegurin skal leggjast afturum leikhúsbygningin. Vitjandi, sum koma í bili, mugu ganga yvirum vegin.

Tað tykist náttúrligt at venda forhøll og hervið høvuðsinngongd móti vágni. Hetta vil tó forða fyri beinleiðis atkomu at leikhúsinum fyri vitjandi, sum koma í bili og parkera í p-húsinum.

Vørukoyring er lýst at vera á norðursíðuni. Bilar kunnu seta vitjandi til leikhúsið av og taka tey uppí á landnyrðings- og útsynningssíðuni, har eisini verður skotið upp at skapa eitt torg. Her er útsýnið tó vánaligt, hvat vegakervi viðvíkur.

Dómsnevndin vísir á, at staðseting 1 hevur við sær avbjóðingar í byggitíðini, tá hugsað verður um tað avmarkaða plássið í sambandi við veiting av byggitilfari, og at ein ferðsluvegur møguliga skal vera atkomuligur tvørtur um byggiplássið.

**Deilniðurstøða 1:**
Staðsetingin hevur við sær møguleikar fyri víðkaðum samstarvi við verandi býarlív og mentanarlív, og so hevur staðsetingin gott samband við bryggjuna og sjógvin.

Staðsetingin hevur tó eisini fleiri avbjóðingar við sær, eitt nú bygging og rakstur av p-húsinum, og at ferðsluvegurin skal leggjast uttan um bygningin.

Møguleikin at gjøgnumføra uppskotið er treytaður av, at p-húsið verður bygt, og hetta liggur í óvissu.

**Staðseting 2 (uppskot 75238) Eystara Vág, Bursatangi**

Uppskotið vísir á staðseting av Tjóðleikhúsinum á eystursíðuni á Eystaru Vág við Bursatanga.

Her verður skotið upp at breiðka atløgubryggjuna á Bursatanga og at staðseta bygningin har. Víðari verður skotið upp at umskapa bryggjukantin og at flyta atløguna hjá ferjunum, sum leggja at har í dag.

Í mun til vágna, so er bygningurin lagdur tvørur og drigin eitt sindur út í vágna.

Skotið verður upp at skapa eitt torg, sum vendir móti býnum, og at parkeringin verður skipað á økinum sunnanvert bygningin.

Dómsnevndin heldur, at víðkan av atløgubryggjuni og at leggja bygningin tvørt fyri, fær bygningin til at fylla ov nógv í kringsýninum, sæð frá Kongabrúnni, og at hann soleiðis avmarkar upplivingina av vágni.

Harnæst tykjast gonguleiðirnar millum bygningin og bryggjukantin óneyðuga trongar, og dygdirnar í møguligum útirúmum verða ikki nøktandi.

Atkoma og parkering kann skipast ómakaleyst. Bygging á hesum staði vil verða íkast til býarmenning í júst havnarøkinum.

**Deilniðurstøða 2:**
Dómsnevndin metir staðsetingina at vera lagda ov langt út á vágna, og bygningurin er tí ov sjónskur í stóra landslagsrúminum, av tí at hann mest sum byrgir fyri útsýninum yvir vágna og útsýninum handan bygningin.

**Staðseting 3 (uppskot 71421) Eystara Vág, Bursatangi**

Uppskotið vísir á staðseting av Tjóðleikhúsinum tætt við miðbýin millum hav og land á eystursíðuni við Eystaru Vág á Bursatanga – ein staðseting, sum kennist innbjóðandi.

Ein fín tillaging av bryggjukantinum, ið loyvir staðseting av einum bygningi, sum hevur gott samband við sjógvin, tó uttan at troka seg út í rúmið, sum vágin krevur.

Harafturat vísir uppskotið, at ein bygningur á hesum staði kann standa sum sjálvstøðugur, eyðkendur bygningur uttan baksíður – eisini við atliti at høvuðsferðsluvegnum framvið berginum.

Við at stytta atløgubryggjuna við Bursatanga, verður sambandið víðkað frá vágni inn móti botninum, har tú upplivir útsýnið móti sjónum og havnarlagnum, annahvørt til gongu ella í bili. Somuleiðis verður hóskandi fjarstøða millum leikhúsbygningin og Tinganes.

Tillagingin og umskapanin av bryggjukantinum skapar fínar gonguleiðir og býarrúm rundan um bygningin, eins og møguleiki verður fyri, at útferðaskip sum Westward Ho, Norðlýsið og aðrir frítíðarbátar kunnu veita ískoyti til býarlívið í økinum, soleiðis at býarlívið ikki einans er tengt at leikhúsvirkseminum.

Við at stytta atløgubryggjuna við Bursatanga, verður sambandið víðkað frá vágni inn móti botninum, har tú upplivir útsýnið móti sjónum og havnarlagnum, annahvørt til gongu ella í bili. Somuleiðis verður hóskandi fjarstøða millum leikhúsbygningin og Tinganes.

Umskapanin av bryggjuni tykist tó at vera víðfevnd við atliti at bæði kostnaði og virksemi. Hetta ávirkar tó ikki dømingina.

Bæði koma, tilkoyring og parkering kann ómakaleyst skipast við beinleiðis íbinding í verandi vegakervið og á verandi lendi.

Uppskotið er framskygt og bjóðar inn við hugskotum um, hvussu alt bryggju- og havnarøkið suðureftir móti nýggju vinnuhavnin við tíðini kann takast uppí og umskapast til at hýsa nýggjum býarvirksemi. Uppskotið vísir rættiliga beinleiðis á møguleikarnar fyri býarmenning, sum ein væl umhugsað staðseting av Tjóðleikhúsinum á Eystaru Vág kann lata upp fyri.

Eitt tjóðleikhús á hesi staðseting, sum er lutfalsliga nær Kongabrúnni, kann virka sum ein inngongd ella ein portalur til miðbýin, bæði frá sjógvi og landi.

**Deilniðurstøða 3:**
Uppskot 3 er ein lívsterk ætlan, sum letur upp fyri sambandinum millum býin og sjógvin, sum varðveitir útsýnið móti Skansanum, og sum vísir Tjóðleikhúsið sum ein stakan, heilskapaðan og sjálvstøðugan bygning uttan baksíður.
Burtursæð frá umfatandi umskapanini av bryggjukantinum, krevur uppskotið ikki stórvegis inntriv á havnarøkinum.

**Staðseting 4 (uppskot 22021-2) Eystara Vág, Bursatangi.**

Uppskot 4 peikar á staðseting við Bursatanga og vísir ein bygning, har hin eina langsíða liggur framvið Havnargøtu, parallell við bergið.

Við at staðseta bygningin her, vinnur mann fleiri fyrimunir. Bygningurin kemur tættari at miðbýnum, og tað gerst ikki neyðugt at umskapa bryggjukantarnar, og soleiðis verður tilfarseykennið og søgan á staðnum varðveitt.

Somuleiðis gevur hendan staðsetingin møguleikar fyri at skapa dygdargóð útirúm móti suðri- og vestursíðuni av bygninginum.

Til dømis kann útiuppihald seinnapartin og um kvøldið skapast móti vestursíðuni av bygninginum, og frá miðbýnum vil hendan bygningssíðan og lívið og virksemið, sum kann fara fram har, vera at síggja og uppliva.

Soleiðis kanst tú, kemur tú frá miðbýnum, ganga móti einum opnum – helst livandi býarrúmi – og ikki móti eini framsíðu, sum vendir móti norðri og liggur í skugga.

Langsíðan framvið berginum kann verða fatað sum ein baksíða móti vegnum. Henda bygningssíðan kann væntast at verða krevjandi í tilgerðararbeiðinum.

Vørukoyring og starvsfólkaatkoma kann skipast burturi frá meginuppihaldsøkinum. Ferðsla til leikhúsið og parkering kann skipast einfalt og ómakaleyst á verandi ferðsluøki sunnanfyri bygninginum og bindast í vegin, soleiðis at dragandi síðan móti vágni verður ótarnað og kann verða skipað til fríløtu-virksemi.

Sæð frá býnum, er byrgt fyri útsýnið út á Skansan – tó letur tað seg upp aftur, so hvørt sum mann fer út eftir Havnargøtu, innrammað av berginum og av leikhúsbygninginum.

Staðsetingin, sum er lutfalsliga nær Kongabrúnni, kann virka sum ein inngongd ella ein portalur til miðbýin, bæði frá sjógvi og landi.

Hendan staðsetingin kann, sum frá líður, verða fyrsta stigið móti einari meira umfatandi menning av býnum á hesum parti av havnarlagnum.

**Deilniðurstøða 4:**
Ein lívsterk ætlan, har bygningurin verður staðsettur við hóskandi fjarstøðu millum nýggja bygningin og Tinganes. Tó kann bygningurin fáa eina baksíðu.
Ætlanin vísir eina staðseting, sum gagnnýtir verandi bryggju til at skapa fjøltáttað býarrúm við einari innbjóðandi framsíðu. Ætlanin er tó treytað av umskipanum, eitt nú umskipan av bilrøðunum til Smyril Line v.m.

**Staðseting (uppskot 040926) Eystara Vág.**

Í uppskotinum verður Tjóðleikhúsið og parkering staðsett heilt inn ímóti berginum, eitt sindur sunnanvert atløgubryggjuna við Bursatanga.

Bygningurin líkist einum manngjørdum fjalli, sum skapar eina røð  av uppihaldsøkjum á forskotnu tekjunum, sum við trappum binda saman býlingarnar við Vaktarhúsbrekku/Jónas Broncks, við havnarøkið.

Dómsnevndin virðismetir staðsetingina frá tí sjónarhorni, at bygningurin við síni støðd og staðseting ikki ger seg inn á Tinganesi.

Harafturímóti metir dómsnevndin tað vera torført at gera stóra takøkið nóg dragandi sum uppihaldsøki og helst eisini torført, deils at raðfesta og varðveita hesar bindingarnar og at gera bygningin nóg sjónligan í umhvørvinum. Somuleiðis ger bygningurin seg inn á bergið, sum í dag stendur rættiliga bæriligt og harafturat verður útsýnið frá býnum út á Skansan munandi skert.

Viðvíkjandi ferðslu krevur henda staðseting, at Havnargøta verður grivin niður undir palltornið, og metir dómsnevndin hetta vera eina óneyðugt trupla loysn fyri ferðsluna, sum eisini setir krøv til ljóðviðurskiftini í bygninginum.

Frá vegnum undir bygninginum er innkoyring til tann partin av parkeringsøkinum, sum er lagdur undir jørð, og er hetta ein kostnaðarmikil loysn sum tykist óneyðug. Kostnaðurin í sær sjálvum, ávirkar tó ikki dómsnevndarúrslitið.

Býarrúm eru í høvuðsheitum millum bygningin og miðbyin – í minni mun sunnanvert bygningin. Vegaføring og vegaskráir til koyring undir leikhúsið, skulu sameinast við hesi býarrúm. Býarrúmið móti býnum verður sera vítt og fevnir um Bursatangan, meðan økið beint vestanvert bygningin og víðari móti sjónum ikki er partur av hesum. Bygningurin fær sostatt ikki samband við sjógvin, hóast staðsettur á Bryggjuøkinum.

**Deilniðurstøða 5:**
Staðsetingin ber við sær umfatandi inntriv í verandi ferðsluviðurskifti, m.a. umlegging av Havnargøtu til koyring undir bygningin.

Dómsnevndin er harumframt ivingarsom í mun til bygging móti berginum og hevur dómsnevndin ta áskoðan, at henda staðsetingin ikki gevur Tjóðleikhúsinum uppibornu tignina.

**Staðseting 6 (uppskot 13579) Eystara Vág**

Við sínari staðseting vendir hetta uppskotið sær ímóti Skansanum.Virksemið í Tjóðleikhúsinum verður lagt í ein bygning, sum eisini fevnir um verandi farstøð og bindur hendan stóra bygningin saman við Skansan.

Íblástur til hetta er Skansin í Marseille, sum í 2013 fekk ein nýggjan grannabygning, MUCEM, (Museum of Civilizations of Europe and the Mediterranean) og hesi verkløgini vórðu bundin saman við einari gongubrúgv.

Hóast hugvekjandi støðið og møguleikarnar at draga Skansan uppí, metir dómsnevndin at staðsetingin, sum hálvavegna er at meta sum útjaðarin í mun til miðbýin, ikki megnar at gerast eitt beinleiðis ískoyti til býarlívið, men vil krevja eitt bindilið millum Tjóðleikhúsið og býin.

Ei heldur metir dómsnevndin samanbyggingina við farstøðina, at vera til fyrimuns framyvir, av tí at hetta hevur nógvar bindingar við sær og vil væntandi verða atvoldin at óneyðugum trupulleikum og óvissum við atliti at praktiskum viðurskiftum og trygdarviðirskiftum í mun til kjarnuvirksemið hjá Tjóðpallinum.

Dómsnevndin sær heldur ongan fyrimun í at samantvinna umsitingarligu og fíggjarligu viðurskiftini hjá ávikavist Tjóðleikhúsinum og Strandferðsluni, ikki at tala um, at samfelagsligi týdningurin er heilt hvør sín.

**Deilniðurstøða 6:**
Uppskotið hevur við sær stórar umskipanir av verandi virkseminum á bryggjuni. Dómsnevndin metir, at samanbygging av Tjóðleikhúsinum við farstøðina er trupul, bæði við atliti at virkseminum og at samfelagsliga týdninginum, og at tað vil verða atvoldin at óneyðugum bindingum.

**Staðseting 7 (uppskot 13579-1) Boðanes**

Uppskotið vísir á staðseting omanfyri Boðanes, eystanfyri Tórshavn, umleið har, sum vegurin Yviri við Strond snarar frá sjóvarmálanum ímóti vestri.

Hendan staðsetingin tekur støði í stóru ætlanini hjá Tórshavnar Kommunu um eitt frílendisøki á Boðanesi og í Hoyvík.

Hugsanin er, at Tjóðleikhúsið fær egnan samleika og eyðkenni av, at vera staðsett í óskalaðari náttúru og kann vera tilhaldsdepil í sambandi við gongutúrar, uttandura virksemi, uppihald og upplivingar. Tó er Tjóðleikhúsið staðsett innanvert vegin og útsýnið út á havið og náttúruna, verður tarnað av ferðsluni á vegnum. Harafturat er økið longu merkt av stórum vinnubygningum á økinum omanfyri Tjóðleikhúsið, og at enda kann uppskotið ikki vísa á nøktandi parkeringsmøguleikar, sum er alneyðugt, havandi í huga, at flest vitjandi fara at koma í bili.

Dómsnevndin metir ei heldur, at staðsetingin lýkur treytirnar um at stuðla undir býarlívið í Havnini.

**Deilniðurstøða 7:**
Uppskotið hevur áhugaverd brigdi har Tjóðleikarhúsið verður partur av eini møguligari frítíðar- og mentanarrás. Dómsnevndin metir tó ikki, at uppskotið í nøktandi mun lýkur krøvini í skránni um at verða mennandi fyri býin, sum savningarstaður og lívskapari.

Tórshavn 05.03.2021

Ólavur Jøkladal

Poul Geert Hansen

Bjarni Wilhelm

Jenny Petersen

Jóan Petur Hentze

Birita Wardum

Bárður í Baianstovu

Ellen Braae

Thale Bjørnerheim

AVRIT